Rútmisk stórkapping í fimleiki:

# Útlendskar avbjóðingar til bestu liðini

**Føroyski fimleikurin spílar seg út og hevur møguliga fleiri avbjóðingar at bjóða fimleikarunum uttan fyri landoddarnar. Leygardagin 6. mars og sunnudagin 14. mars eru stórkappingarnar í rútmiskum fimleiki í Runavík, og vinnandi liðini fáa øll okkurt burtur úr sigrum sínum.**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Stórkappingin í rútmiskum fimleiki verður hesa ferð í ítróttarhøllini í Runavík og verður hon í tveimum. Leygardagin 6. mars kappast smágentur og kvinnur, og sunnudagin 14. mars kappast pinkur og gentur. Báðar dagar byrja kappingarnar klokkan 15.

Feløgini, sum eru við í stórkappingini í ár, eru Støkk av Glyvrum, Flog úr Fuglafirði, Havnar Fimleikafelag og Ljósið úr Havn.

Kappingin hjá smágentum um leygardagin 6. mars er við tveimum serium, einari fríari og einari amboðsseriu við hoppibondum. Tá tær eru lidnar, fara kvinnurnar at kappast, somuleiðis í tveimum serium, har amboðini eru vimplar.

Góða viku seinni, sunnudagin 14. mars, verður lagt fyri við pinkum, ið hava eina seriu, áðrenn genturnar fara at kappast í tveimum serium, har tær hava bóltar sum amboð.

Stórkappingin er bert eina ferð um árið, men tá kunnu fimleikararnir eisini vísa øll síni kynstur, eftir at vant hevur verið dúgliga síðani september mánað.

## Donsk vitjan

Dømingin í føroysku stórkappingini í fimleiki er tann sama, sum verður brúkt í Danmark. Tað vil siga, at dømt verður tøkniliga, listarliga og eftir framførslu.

Yvirhøvur leggur føroyski fimleikurin seg eftir at nøkta somu krøv sum aðrastaðni, og tí hevur tað eisini ligið væl fyri hjá føroyskum fimleikaliðum, sum eitt nú hava verið við til stórar danskar kappingar.

Ein síðuvinningur hjá bæði gentum og kvinnum er, at vinnandi liðini sleppa við sum gestalið til kappingina um danska meistaraheitið í apríl og mai.

Undanfarnu árini hevur eitt lið verið við til hesa kapping, og hvørja ferð hevur verið staðfest, at føroysku fimleikararnir standa seg framúr væl millum bestu donsku liðini.

Samstarvið gongur tó eisini hinvegin, tí til ta seinnu stórkappingina kemur kvinnuliðið hjá Greve á vitjan sum gestalið. Venjari hjá liðnum er væl kenda Helle Storm.

Eins og føroysku liðini í donskum kappingum verða dømdar á sama stigi sum donsku liðini, fer liðið hjá Greve eisini at fáa karakter, eins og føroysku kvinnuliðini.

Einki er at ivast í, at hetta ger kappingina enn meira spennandi, tí liðið úr Greve er gott, og eisini eru tað hesum fimleikarunum, føroysku kvinnurnar skulu kappast ímóti, tá kappingin um danmarkarmeistaraheitið verður.

## Heiðursmerki og steyp

Trý tey bestu liðini í stórkappingini fáa heiðursmerki fyri hvørja seriu sær, umframt at ognarsteyp verður latið fyri samanlagda úrslitið.

Í sambandi við kappingarnar hevur Fimleikasamband Føroya sølubúð við kaffi, køkum og øðrum, umframt at tombola verður til frama fyri eitt fimleikagólv/-teppi og stuðul til teir fimleikarar, ið seinni skulu til Danmarkar at kappast.

Fimleikasambandið sigur seg vóna, at nógv fólk kemur til stórkappingina í Runavík bæði leygardagin 6. mars og sunnudagin 14. mars. Atgongumerkini kosta 80 krónur fyri vaksin og 10 krónur fyri børn.

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM



## Frítíðaravloysarar



**Søkt verður eftir frítíðaravloysarum til ferðamannadeildina at byrja skjótast gjørligt.**

**Starvið fevnir um:**

- Avgreiðslu av ferðafólki bæði á skrivstovuni, yvir telefon, telefaks og t-post
- Bílegging av hotellum, summarhúsum, íbúðum, v.m.
- Skipaavgreiðsla/Check-in
- Vanligt skrivstovuarbeiði





**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst, at umsøkjarin hevur nakað av teldukunnleika og kann málbera seg á enskum og/ella týskum - bæði í skrift og talu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi er røkin og hevur góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti:**
Starvstíðin er frá nú av og til umleið 15. august/ 1. september

**Umsóknir:**
Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast til:

***Smyril Line***
***c/o Áki Jespersen***
***Postsmoga 370***
***FO-110 Tórshavn***

ella við telduposti til:

***booking@smyril-line.fo***

Umsóknin skal vera okkum í hendi skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Áka Jespersen á tlf. 34 59 00.

Smyril Line varð stovnað í 1982, við tí endamáli at knýta saman londini í Norðuratlantshavi, Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark.

Hvørt summar síðan 1983 hava fyrst gamla Norröna, ið hevði pláss fyri 1.050 ferðafólkum og 300 bilum, og síðani nýggja Norröna, sum hevur pláss fyri 1.482 fólkum og 800 persónbilum, siglt millum hesi lond.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Danmark/Hanstholm, Noregi/Bergen, Íslandi/Reykjavík og í Shetlandi/Lerwick. Agentar í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Frankaríki og Italia.

Á ferðamannadeildini er møguligt at avgreiða allar ferðir, bæði við skipi og flogfari. Flogdeildin hevur við sínum IATA loyvi møguleika at avgreiða flogferðir kring allan heim.

SMYRIL LINE



SMYRIL LINE

SORG OG TRAUMA HJÁ BØRNUM

SKEIÐ VIÐ DR. ATLE DYREGROV

Verður 18. mars á Hotel Føroyum frá kl. 08.00 - 15.30

Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1450,- u/MVG

Íroknað skeiðið er:
· morgunmatur
· 2 x kaffi við køku
· gott sjálvtøkuborð við 1 øl/vatn

**- Skeiðið er ætlað teimum, ið dagliga arbeiða við børnum og/ella hava áhuga í evninum.**

Tema á degnum:

**Sorg og trauma hjá børnum**

· Sorg og traumareaktiónir hjá børnum

· Góðir tilbúgvingarvanar til tey sum ansa børnum

· Hjálp til børn í samband við kreppu, sorg og trauma
 · hjálp beint eftir hendingina
 · langtíðaruppfylging

· Hjálp í barnagørðum og skúlum
 · nýtsla av ritualum
 · nýtsla av bólkum
 · sjálvhjálparhættir

· Viðgerð/terapi av børnum aftaná sorg og trauma

**Atle Dyregrov** er kendur norskur barnapsykologur, sum er ein kapasitetur á sínum øki. Doktararitgerð hansara var um: "Familiers reaksjoner ved tap av et barn".
Hann hevur skrivað fleiri bøkur, m.a. bókina "Sorg hos barn", sum er útkomin á 9 málum. Bøkur hansara verða nýttar sum lærubøkur víða um.
Í sambandi við sorg-tilbúgvingarætlan í skúlaverkinum, kann nevnast, at m.a. svenska skúlaverkið nýtti Atle Dyregrov og bøkur hansara, tá tey gjørdu til búgvingarætlanina til skúlaverkið. Sama hava fleiri skúlar í Danmark gjørt.

Atle Dyregrov hevur, sum spesialistur, verið knýttur at nógvum størri vanlukkum og katastrofum í inn-og útlandi. Eitt nú diskoteks-brandvanlukkuni í Göteborg í 1998, har hann helt fyrilestur fyri 900 starvsfólkum í svenska skúlaverkinum og var við í uppfylgjandi arbeiðinum. Atle Dyregrov hevur m.a. verið konsulentur fyri Reyða Kross, FN's hákommissión fyri flóttafólk og Unicef. Dagliga starvast hann sum stjóri á "Senter for Krisepsykologi" í Bergen.

Team85

Tilmelding á heimasíðu, telduposti, á tel millum kl. 13.00 - 16.00 ella fax 322355

Synergi
synergi@synergi.fo· tel 22RING (227464)· tel 22KIMA (225462)· www.synergi.fo

Vikuskifti

Nr. 46 • leygardagur • 6. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Mín trúgv er ein lívsháttur

Samrøða við norðurírska Sarah Munro



Lesið síðu 2–3

# Jósef heimsøkir Norðurlandahúsið



*Týsdagin fer stóri sangleikurin Jósef og tað ótrúliga litfagra dreymakotið av bakkastokki fyri almenninginum og vant hevur verið dúgliga*

SANGLEIKUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

1. mars í 1968 varð ein sangleikur á fyrsta sinni vístur í Onglandi við støði í bíbliusøguni um Jósef og brøður hansara. Ungu menninir handan leikin itu Tim Rice og Andrew Lloyd Webber, og fá grunaðu tá, at bæði hesir ungu menn og sangleikur teirra skuldu vinna hjørtu kring allan heim mong ár fram.

36 ár seinni verður leikurin "Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið", sum Dánial Hoydal og Anna Kristin Bæk hava føroyskað, framførdur í Norðurlandahúsinum. Rytmiska kórið á Studentaskúlanum í Hoydølum við leiðarunum Zacharias Sørensen og Hans Olivur Joensen fóru undir fyrstu fyrireikingarnar, men verkætlanin er vaksin so nógv og er farin so langt út um skúlans karmar, at nú eru millum 80 og 100 fólk tengd at sangleikinum, sum hevur kostað millum hálva og eina millión. Í samstarvi við Norðurlandahúsið, Útvarp Føroya, Musikskúlan og kvøldskúlan er sangleikurin vorðin veruleiki, og fíggjarligu grundstuðlarnir hava verið Føroya Tele og Føroya Banki.

Uttan nakra fyriliggjandi fíggjarlóg hevur sjálvur Studentaskúlin í Hoydølum formliga ikki kunnað staðið fyri leikinum, men áhugafelagið Tónaungdómar, sum rútmiska kórið í Hoydølum er limur í.

## Sangleikur til øll

– Talan er um størstu verkætlan tengt at einum skúla nakrantíð. Leikurin vendir sær til ein ógvuliga breiðan málbólk, og gongur hann alskyns listarligu skapanarevnum og sansum mennskjunnar á møti. Sjónleikur, solosangur, tónleikur, kórsangur, ljósshow, dansur og klædna- og palldesign skapa ein fjølbroyttan sangleik, sum inniheldur sorg, gleði, humor og yvirraskilsi, sigur upprunaligi stigtakarin og hornasteinurin í verkætlanini, Hans Olivur Joensen, sum undirvísir í tónleiki í Hoydølum. Sostatt vendir sangleikurin sær sambært Hans Olivur til ein breiðan málbólk, tí hann hevur eitt so breitt skapanarhugflog at bjóða áhoyrarum og áskoðarum.

– Tað ræður um at koma við opnum sinni, og so skal ein nokk bæði fara at flenna, verða bergtikin, gerast kløkkur og fáa ein klump í hálsin, sigur Hans Olivur Joensen skemtandi.

Saman við Hans Olivur Joensen eru í stýrisbólkinum Mads Winther (rektari), Herleif Hammer (framleiðslustjóri) og Bo Isholm (stjóri á Tórshavnar Musikskúla), men stigtakarin ynskir heldur at varpa ljós á kreativu grundstuðlarnar í sangleikinum.

– Leikstjórin Jákup Veyhe, koreografurin Jóna Thomsen og kórleiðararnir Zacharias Sørensen og Sigrid Sivertsen hava gjørt eitt megnar arbeiði, og uttan tey høvdu vit ikki fullført verkætlanina, heldur Hans Olivur Joensen.

## Skúlin vorðin ov lítil

Viðvíkjandi vali av sangleiki heldur Hans Olivur Joensen, at júst hesin leikurin hjá navnframa Andrew Lloyd Webber gekk krøvum teirra á møti.

– Talan er ikki fyrst og fremst um soloavrik, men heldur um eina kollektiva framførslu, sum skal ganga upp í eina hægri eind, og tískil er ábyrgd á so nógvum næmingum sum gjørligt, sigur Hans Olivur Joensen. Fyri tveimum árum síðani varð líknandi verkætlan roynd á sjálvum skúlanum við sangleikinum Godspell, og nú eru ungu, skapandi kreftirnar í Hoydølum farnar út um skúlans gátt og niðan í Norðurlandahúsið til nógv stórslignari og professionellari umstøður, sum sambært Hans Olivur eisini er ein motivatiónsfaktorur.

– Hetta eggjar sjálvsagt øllum næmingunum at leggja orku í arbeiðið, samstundis sum tað mennir tónlistarliga umhvørvið, sigur tónleikalærarin úr Hoydølum. Ætlanin hevur sambært honum verið í umbúna í eitt gott ár, meðan tónleikarar, kór, dansarar og sjónleikarar hava vant miðvíst síðani 1. januar.

Fyri at finna sjónleikarar varð skipað fyri upptøkuroynd á skúlanum, men trupulleikin var, at nógv størsti áhugin var millum gentur, hóast leikurin snýr seg um Jósef og hansara brøður.

– Umleið 100 næmingar meldaðu seg til upptøkuroynd, harav 80 gentur, og tá okkum mest nýttu dreingir til sjálvan sjónleikin, stóðu vit í fyrstu syftu við einum trupulleika, sum tó lagaði seg, sigur Hans Olivur Joensen.

Samanumtikið er lagt upp til stóra og spennandi frumframførslu í Norðurlandahúsinum týskvøldið við størsta sangleiki síðani Skeyk og størstu skúlaverkætlan nakrantíð, og sambært stigtakaranum Hans Olivur Joensen skulu vit vænta okkum ein sangleik við listarligum skapanarevnum í alskyns sjangrum og fjølbroytni.

Meira kann lesast um leikin á www.hoydalar/josef.fo